BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

18. desember 2025
Mál: 22/22133-146
Viðgjørt: EØ

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-060/2025 frá Anniku Olsen, løgtingskvinnu, eftir § 52a í Tingskipanini, settur Djóna Nolsøe Joensen, landsstýrismanni í barna- og útbúgvingarmálum, um samsýning til fosturforeldur.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Er Fosturforeldrafelagið við í arbeiðinum í sambandi við eftirmeting av fosturforeldraskipanini?
2. Um nei, hvør er orsøkin til tað?
3. Er spurningurin um samsýning til fosturforeldur ein partur av hesum arbeiðinum?
4. Er ætlanin at hækka samsýningina til fosturforeldur?

Svar

Til 1 og 2: Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevði tann 9. desember 2025 innleiðandi fund um arbeiðið at eftirmeta fosturforeldraskipanina, har allir viðkomandi partar, eitt nú Fosturforeldrafelagið, luttóku.

Eftir ætlan fer sjálvt arbeiðið í gongd í januar 2026, og verður Fosturforeldrafelagið og aðrir viðkomandi partar tikin við undir tilgongdini av arbeiðinum.

Til 3: Ja, spurningurin um samsýning fer at verða fevndur av arbeiðinum.

Til 4: Í hvønn mun ætlanin er at hækka samsýningina, er tongt at tí niðurstøðu, sum kemur í sambandi við greining av sp. 3, men ikki er ósannlíkt, at samsýningin verður broytt.

Vísandi til at kommunurnar eru inn yvir, hvat fígging viðvíkur, er tað tó umráðandi at hava tær við í hesum, soleiðis at ein skynsamur fíggingarleistur við samsýningum verður gjørdur.

Vinarliga

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður